**Handil**
*Lýsingartilfar*

P/F SveisingaHandilin




*Starvsfólk hjá Sveisingahandlinum f.v.: Jákup Andrias Arge, Bárður Simonsen og Andreas Petur Hansen. Jákup Eli Joensen vantar á myndini*

*Myndir: Jens Kristian Vang*

# Olja og gass í Mykinesgøtu

SVEISINGAHANDILIN Í MYKINESGØTU ER EIN FYRITØKA, SUM HEVUR SPESIALISERAÐ SEG Í ØLLUM, IÐ HEVUR VIÐ SVEISING OG GASS AT GERA UMFRAMT OLJU TIL AKFØR, SKIP OG FLOGFØR

**Magnus Gunnarsson**

Í Sveisingahandlinum í Mykinesgøtu fæst alt sum hevur við sveising, smyrjiolju og gass at gera.

Sveisingahandilin er ein gomul og kend fyritøka í býnum. Tað var Gullak Zachariassen í Havn, sum stovnaði handilin í Sverrisgøta í miðbýnum beint eftir seinna heimsbardaga. Hann seldi m.a. sveisitól, elektrodir, gass og annað til jarnsmíð.

Tað var tá Viljormur Tórsheim keypti handilin í 1969, at hann fekk navnið Sveisingahandilin.

Handilin helt fram á sama stað, til hann seinni flutti oman í Vágsbotn. Í sjeytiárunum bygdi Viljormur ein virkisbygning í Jóannesar Patursonargøtu og Sveisingahandilin flutti inn har.

Í 1992 varð handilin seldur til Jóhan Simonsen, sum segði eitt leiðandi starv í Føroya Banka frá sær og fór at reka handilin. Jóhan gjørdist í 1993 umboðsmaður fyri Mobil Oil og fór hann undir at selja olju (undantikið brenniolju) til akfør, skip og flogfør. ExxonMobil er eitt av størstu oljufeløgum í heiminum og ger nakrar av bestu smyrjioljunum á marknaðinum.

Síðan 1996 hevur Sveisingahandilin verið í stóra virkisbygninginum í Mykinesgøtu, sum varð keyptur til endamálið. Bygningurin er umleið 700 fermetrar til støddar við stórari goymsluhøll, handli og framsýningarhøli. Í 2006 seldi Jóhan handilin til sonin Bárð Simonsen, sum í dag er stjóri í Sveisingahandlinum.

Sveisingahandilin er í dag heildarveitari av øllum innan sveising, umframt at gass eisini er ein av høvuðstáttunum í virkseminum hjá fyritøkuni. Har eru nógv ymisk sløg um t.d. propangass, oxygen, acetylen, argon, argonmix, nitrogen og $CO_2$. Eisini er ein fyllistøð til oxygen sett upp á økinum. Handilin selur umframt øll sveisiamboð eisini hondamboð, trygdarútgerð, grillútgerð og tjaldingarútgerð.






